## HEILSANIR



**Góða fitta Sólja**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 8 ára degnum ídag. Jesus pápi signi framtíð tína. Minnist tú henda deiliga túrin?
**Jóhanna, Elmar, Kristin, Filip, mamma og babba**



**Góði tit bæði**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúðleypsdegnum 12. jan. Alt gott í framtíðini ynskja vit tykkum.
**Heilsan døtur, svigarsynir og lítla Rebekka**



**Góði fitti Markus**
Hjartaliga tillukku á 1 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Bestu heilsanir omma og abbi**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum mintust til mín á fermingardegnum 10. okt. 2004. Gott nýggjár.
**Heilsan Gurið Kallsberg Kristiansen, Vágur**



**Góði Hanus**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Vónandi fáa vit onkran góðan túr í summar.
**Bátsfelagin**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....................................................................
Bústaður: .................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«


Nýtt tíðarrit:

# Outsidarin er in

**Í mars mánað kemur nakað so forkunnugt sum eitt nýtt føroyskt mentanartíðarrit á gøtuna. Tað er viðmerkjarin og høvundurin, Kim Simonsen, sum verður blaðstjóri á nýggja blaðnum**

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Føroyska bókmenta- og listaumhvørvið vantar bókmenta- og listakritikk, tí í løtuni er einki tíðarrit, ið tekur sær av list og bókmentum. Hetta ger, at mangt, sum er vert at lesa og lurta eftir, ikki verður viðgjørt, sigur Kim Simonsen, blaðstjóri á nýggja tíðarritinum Outsider Magazin, í tíðindaskrivi.

### Ikki ein provokatión

Herfyri skipaði Rithøvundafelagið í Føroyum fyri fundi í Norðurlandahúsinum um hetta evnið, har tey kjakaðust um støðuna hjá føroyskum ummælum. Seinni varð evnið tikið upp aftur í Fimmarinum. Ein av niðurstøðunum hjá panelinum og teimum spurdu í sendingini var, at ein triðingur ella ein helvt av bókunum, ið koma út í Føroyum, ikki vóru borðbarar. Fleiri ferðir varð tí eftirlýst eitt modernað tíðarrit fyri list og bókmentir, ið kundi taka sær av at menna eitt kjak um bókmentir og list í mun til føroyska samfelagið í dag. Kim Simonsen heldur tað tí vera í tøkum tíma, at farið verður undir at geva út eitt nýtt føroyskt tíðarrit, ið skal eita OUTSIDER Magazin.

– Hetta er ikki meint sum eitt provokerandi blað. Navnið ber bert í sær ta vitan, at tað er uttanfyri, at alt hendir í dag, og skal man hava nakran týdning, er tað ikki verri at hava eitt altjóða áhugavert navn, sigur Kim.

### Outsidarin á pallin

– Ummæli eru neyðug, men tey eiga ikki at standa einasmøll, tí veruligur kritikkur og kjak er annað og nógv meiri enn ummæli í bløðum. Neyðugt er, at vit hava bløð, ið tora at gera eina heildarmeting av bókmentum og list. Teir bestu filmarnir koma út uttanfyri tey stóru feløgini, kendur tónleikur er komin frá outsidarum, og tey smáu londini í heiminum hava ofta teir bestu høvundarnar o.s.fr. Vit kunnu siga at í 20. øld varð outsidarin in, sigur Kim Simonsen.

Ritstjórnin á Outsider vil fegin hava fólk at skriva søgur, yrkingar og greinar til blaðið, sum eisini miðar ímóti at skapa nakað heilt nýtt og serliga stimbra tey ungu til at skapa og skriva. Hesi skula kunna skriva nýggjar yrkingar, stuttsøgur og annað, sum blaðstjórnin prentar, um hon heldur tilfarið vera nóg gott.

– Eitt av okkara endamálum er eisini at skriva norðurlenskar og enskar tekstir um føroyska list og bókmentir, ið vit serliga leggja á heimasíðuna. Hetta gera vit fyri at økja um kunnleikan um føroyska mentan í Norðurlondum og kring heimin.

– Vit hava kanska ongar føroyskar nútíðarbókmentir, tí ongin torir at skriva tær! Vónandi kunnu vit við hesum blað gera mun, sigur nýggi blaðstjórin, Kim Simonsen.

Haldarar kunnu tekna seg á kimsimonsen@hotmail.com ella við at skriva til Bispebjerg Bakke 1.5.501 2400 Kbh. NV. Ella via tlf. +45 35820202

Longu nú ber til at fáa meir at vita um Outsider á heimasíðuni www.123hjemmeside.dk/outsider, sum eftir bert trimum døgum hevur havt 1300 vitjandi.

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i